# Fimm ár á Guantánamo



**Hósdagin 11. januar 2007 eru fimm ár liðin síðani Guantánamo-fangalegan á Kuba varð tikin í brúk. Amnesty heitir í hesum sambandi á fólk um at senda heilsanir til fangarnar, sum kunnu birta nýggja vón og eisini gera myndugleikarnar varugar við, at áhugi er fyri fangunum og fyri at mannarættindi verða vird**

AMNESTY
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Síðani 2002 hava tilsamans 775 fangar verið afturhildnir á Guantánamo. Í løtuni sita umleið 430 fangar úr 35 ymiskum londum í fangaleguni uttan ákæru ella dóm.

Amnesty International arbeiðir fyri at fangarnir á Guantánamo verða settir fyri ein vanligan dómstól samsvarandi øllum altjóða standardum, uttan at deyðadómur verður nýttur.

– Um hetta ikki verður gjørt eiga teir at verða leyslatnir beinanvegin, sigur Amnesty.

Tí heitir Amnesty á fólk um at senda nýggjársheilsanir til fangarnar. Heilsanirnar kunnu birta nýggja vón og eisini gera myndugleikarnar varugar við, at áhugi er fyri fangunum og fyri at mannarættindi verða vird – eisini á Guantánamo.

Fimm fangar hava fingið loyvi at fáa post uttanífrá og Amnesty heitir í hesum sambandi á fólk um at senda stuðulsheilsanir til fangarnar.

– Heilsanirnar kunna birta nýggja vón í einari svárari tíð og somuleiðis gera myndugleikarnar varugar við altjóða áhugan fyri fangunum, sigur felagsskapurin.

Menninir, hvørs søga verður søgd á heimasíðuni hjá Amnesty og prentað her í blaðnum í vikuni, hava brúk fyri tínum stuðli. Amnesty heitir á fólk um at senda teimum eina heilsu – eina áminning um, at teir ikki eru gloymdir.

Vit endurgeva her søguna um Omar Deghayes, sum stendur at lesa á www.amnesty.fo

# Omar Deghayes

**– Eg var fyri regluligum harðskapi. Hvørja ferð eg var um at missa vitið, varð eg tveittur í klivan aftur – fyri síðani at verða tikin út aftur til eitt nýtt umfar, sigur Omar Deghayes**

Omar Deghayes er 35 ára gamal og mannarættindasakførari. Hann er libyskur / bretskur ríkisborgari. Omar er giftur og eigur ein trý ára gamlan son, sum hann ikki hevur sæð síðan hann var nýføðingur.

Omar starvaðist sum mannarættinda-sakførari í Afganistan, tá 11. september álopini vórðu framd.

Hann gjørdi beinanvegin av, at fara heim aftur við konuni og soninum til tryggari viðurskiftir í Onglandi. Á veg til Onglands handtóku menn úr pakistanska herinum Omar og handaðu amerikansku myndugleikunum hann – sum sambært frásøgnum góvu pakistansku myndugleikunum 5000 $ fyri Omar.

Omar hevur verið á Guantánamo síðani september 2002, har hann ferð eftir ferð er píndur.

Omar verður hildin aftur, tí CIA hevur fingið fatur á einari sjónbandsupptøku av einum Al-Qaeda fundi, har Omar sambært CIA er til staðar. Omar, sakførari hansara og familja hansara halda fast við, at maðurin á sjónbandsupptøkuni ikki er Omar og at Omar einki hevur við Al-Qaeda at gera.



*Mamma Omar Deghayes við mynd av soninum, sum seinastu fimm árini hevur sitið fangið á Guantanamo*

Amnesty ber ótta fyri, at Omar verður sendur til Libyen, sum liður í royndini hjá USA at sleppa av við fólk, ið eru undir illgruna fyri at hava framt yvirgangsvirksemi. I Libyen er Omar í vanda fyri at verða píndur til deyðis. Ein umboðsmaður úr Libyen, sum hevur avhoyrt Omar á Guantánamo hevur sagt við hann: "Tú verður ábyrgdaður í Libyen. Her (á Guantánamo) kann eg ikki gera tær nakað, men hitti eg teg aftur, drepi eg teg"

***Ynskir tú at senda Omar Deghayes eina heilsan, so er adressan henda:***

**Omar Deghayes**
**ISN 727Camp Delta**
**PO Box 160**
**WashingtonDC 20053**
**USA**

**Týdningarmikið at hava í huga, tá kort verða send:**

- Send einfaldar heilsanir, helst á upprunamálinum ella á enskum.
- Send ikki politiskar ella átrúnaðarligar heilsanir – einfaldar heilsanir, sum bera boð um samkenslu eru nóg mikið.
- Send kort uttan trúarligar ella jólaligar myndir.
- Nýt ikki Amnesty kort og nevn ikki Amnesty International.
- Bið ikki um aftursvar, men skriva navn og bústað á postkortið. So kann viðkomandi avgera um hann svarar tínum brævi.
- Merk brævbjálvan "Airmail" og set eitt 10 kr. frímerki á.
- Seinasta freist at senda kort er 28. februar 2007.

Vinarliga send Amnesty eitt avrit, um tú fært nakað svar.